**Díðrikur á Skarvanesi**
**1802-1865**



Díðrikur á Skarvanesi, ið er mettur at vera fyrsta føroyska myndlistafólkið, var føddur á Stóru Dímun. Vit vita ikki nógv um hann, men kunnu bert gita, hvaðan hann hevur fingið tilfar og íblástur til at mála, men møguliga hevur hetta samband við eina ferð til Keypmannahavnar í 1828.

**Hani og høna ca. 1830**
Ikki er vist, hvussu nógv hann hevur latið úr hondum, men á Listasavni Føroya eru fimm myndir varðveittar, sum allar eru fuglamyndir málaðar við gouachelitum á pappír.

Tann eina vísir ein hana við sterkt gulum, svørtum og øðrum litum, umframt eina marglitta hønu við eyðsæddum svartlittum maga. Fuglarnir báðir eru hegnisliga teknaðir, sæddir frá síðuni, og standa á hvør sínum steini og trína greitt fram úr bakgrundini við sínum sterku litum. Díðrikur hevur spælt sær við litunum - soleiðis at teir eru ævintýrkendari og sterkari enn í veruleikanum - og við forminum - sum tykist flatari enn í veruleikanum - umframt við støðuni, sum sýnist tilætlað uppsett. Tað er ikki til at siga, hvat Díðrikur í roynd og veru hevur hugsað. Kanska vil hann vísa á, at hann tekur sær listaligt frælsi.



Díðrikur á Skarvanesi, *Hani og høna* ca. 1830

♥ Finn myndina og set kross: ☐

♥ Dámar tær egg? ja ☐ nei ☐

♠ Gelur ein hani tíðliga á morgni ☐ ella ýlir hann ☐

♠ Hevur ein hani ein hanareik ☐ ella eina hanakrúnu ☐

♦ Hvat er eitt hanagleiv?

♦ Hvat slag av liti er brúkt í myndini?

♣ Kanst tú siga eitt sindur um form og dýpd í myndini?

♣ Kanst tú greiða frá stílinum í myndini?